**Dato:** 26.08.2024
**Ref:** LI/ER

**Til:**

**Feløgini v. m.**

**Mál:** **INNBJÓÐING TIL FSF DÓMARIN - DÓMARASKEIÐ VIÐ PRÓVTØKU 2024**

Í næstum skipar FSF fyri dómaraskeiði við próvtøku. Út frá tilmeldingum verður støða tikin til, nær og hvar skeiðini verða hildin

**Endamál/innihald**
Skeiðið hevur til endamáls, at fyrireika teg til dómarapróvtøkuna, og tá ið tú hevur staðið próvtøkuna, verður tú ein partur av dómarahópinum hjá FSF, og títt arbeiðið sum FSF-dómari kann byrja.

**Tíð og staður**
Útbúgvingin tekur 20 tímar. Út frá tilmeldingunum verður støða tikin til, nær og hvar skeiðið/skeiðini verða hildin.

**Útbúgvingin gevur frálæru í**:

Dómarin**:**

- Fótbóltslógin, 17§´ir sum eru deild í fýra høvuðsevni
    - Byrjan (seta í gongd)
    - Rangstøða
    - Fríspark
    - Málmaðurin
- Tekn/tekngeving (Dómari)
- Fyrisiting ( Dómaraseðil vm.)

**HD-dómari 1**.

- Hvat skal veitrast fyri og hvussu.
- Tekn og kropsmál
- Tulking av rangstøðu. (video/DVD)
- Útskifting

**Felags**

- Verklig undirvísing á vøllinum/samstarv
- Upphiting
- Próvtøka

**Førleikar**

FSF dómari kann døma ungdómsdeildir, 3.deild, 2.deild og Kvinnudeildina.

**Upptøkutreytir**

Luttakari skal vera 15 ár ella eldri. Fyrimunur er um næmingurin hevur tikið grundskeiðið "Dómarin", tað er tó ikki ein treyt. Ynskiligt er, at hvørt felag sendir í minsta lagi 3 luttakarar á skeiðið.

**Luttøkugjald**

Kostnaðurin fyri skeiðið er kr. 1.000. Íroknað kostnaðin er frálærutilfar og kost. Um felagið rindar fyri skeiðið, skal váttan frá felagnum fyriliggja.

**At hava við**

FSF letur lógbók á føroyskum, skriviamboð o.a. Telda verður nýtt til próvtøkuna.

**Tilmelding**

Tilmeldingin fer fram á hesari leinkjuni:
https://forms.office.com/e/4XfJK32tHT?origin=lprLink

Meiri fæst at vita frá FSF-skrivstovuni, tlf 351979.

**Við ítróttarkvøðu**

**FÓTBÓLTSSAMBAND FØROYA**

**Eiler Rasmussen**
**Dómaradeildin**
**Tlf. +298 291988**
**Teldupostur: eiler@football.fo**